# Avgerð

**Skálatrøð 20, tann 03-12-2015**

Journal nr.: 15/00259-8

Viðgjørt: S.R

**um samanleggingina av handlunum hjá Sp/f Haraldsen og P/f Poul Hansen**

## 1. Samandráttur

P/f Poul Hansen og Sp/f KSJ hava fráboðað at smásølan, sum teir hava í dótturfeløgum, verður løgd í eitt og sama felag. Heilsølan hjá P/f Poul Hansen verður verandi hjá P/f Poul Hansen.

Partarnir fáa felagsræði yvir nýggja felagnum, og Høgni Hansen og Kristian Suni Haraldsen verða stjórar í nýggja felagnum.

Talan er um eina transaktión sum er fevnd av §13, stk. 2 í kappingarlógini, og sum skal fráboðast sambært §16, stk. 1 í kappingarlógini, tí umsetningurin hjá luttakandi fyritøkunum liggur omanfyri tey mørk sum eru ásett í §14, stk. 1 í kappingarlógini.

Tann 22. oktober 2015 fekk fráboðari boð um, at samanleggingin kundi ikki góðkennast eftir §15, stk. 5 í kappingarlógini. Víst var á at marknaðarparturin, miðsavningin og onnur viðurskifti gjørdu, at neyðugt var at kannað samanleggingina nærri.

Kappingareftirlitið hevur síðani kannað hesi viðurskifti nærri, og er komið til at samanleggingin kann góðkennast, tí omanfyri nevndu viðurskifti fara ikki at hindra virknu kappingina.

Kappingareftirlitið er tó komið frám á atknýttar avmarkingar, ið Kappingareftirlitið metir verða ov víttgangandi til, at tær kunna góðkennast sum atknýttar avmarkingar til samanleggingina.

### 1.1. Avgerð

Kappingarráðið hevur avgjørt at góðkenna samanleggingina av smásøluni hjá P/f Poul Hansen og Sp/f KSJ, vísandi til §15, stk. 2, 1. pkt. í kappingarlógini, sum sigur at ein samanlegging sum ikki munandi forðar fyri virknari kapping skal góðkennast.

Góðkenningin verður tó treyta av, at broytingar verða gjørdar í Eigaraavtaluni, viðvíkjandi § 5, soleiðis at fyrivarni ímóti kapping skal avmarkast til tað skilmarkað økið í parti 2.4.3 og 2.4.4 í hesi avgerð.

*Fráboðari hevur tann 26. november 2015 sent Kappingareftirlitinum tilsøgn um, at áðurnevndu broytingar í §5 verða framdar.*

## 2. Inngangur

Kappingareftirlitið fekk 11. september 2015 fráboðan sambært §16, stk. 1 í kappingarlógini. Í henni var boðað frá, at eigararnir av Sp/f Haraldsen og P/f Poul Hansen høvdu í hyggju at leggja sína smásølu[1] í eitt og sama felag. Fráboðanin var fullfíggjað tann 24. september 2015.

Kappingareftirlitið var longu kunnað um hesar ætlanir á fundi tann 3. mars 2015. Síðani tá hava samráðingar verið um at leggja saman, og samdust partarnir í september um at leggja saman. Sambært §16, stk. 1 í kappingarlógini er freistin at fráboða:

> *§ 16. Boðast skal frá til Kappingarráðið um eina samanlegging, sum kemur undir § 13, í seinasta lagi eina viku eftir, at sáttmálin um samanlegging er gjørdur, ella almenn fráboðan er gjørd um samanleggingina, ella at onkur ávísur hevur fingið ræðið á fyritøkuni. Freistin er 1 vika frá tí, at eitt av omanfyrinevndu er farið fram og áðrenn samanleggingin verður framd.*

Endaligur sáttmáli var gjørdur millum partarnir tann 10. september 2015, og fráboðan var send Kappingareftirlitinum tann 11. september 2015. Sostatt er freistin í §16, stk. 1 í kappingarlógini hildin.

Tá tvær fyritøkur stovna ein samváða(joint venture) á einum varandi grundarlagi, er talan um eina samanlegging eftir §13, stk. 1 nr. 2, sambært §13, stk. 3 í kappingarlógini. Stovnanin av samváðanum er fevnd av ásetingunum í kapittul 5 í kappingarlógini, um minst tvær av luttakandi fyritøkunum hava ein umsetning í Føroyum sum er omanfyri 15 mió. kr., og samlaði umsetningurin er omanfyri 75. mió. kr.

Í talvuni niðanfyri er umsetningurin hjá luttakandi fyritøkunum.

**Talva 2: Umsetningur hjá luttakandi fyritøkunum**

| Luttakandi fyritøkur | Umsetningur í 2014 |
|---|---|
| Sp/f Svøðan | [....] |
| Sp/f Haraldsen | [....] |
| Sp/f 27.09.2013 | [....] |
| Sp/f frá 2. august 2006 | [....] |
| Sp/f 18.03.2013 | [....] |
| P/f Poul Hansen | [....] |
| Sp/f Sunda | [....] |
| **Tilsamans** | **[....]** |

Kelda: Luttakandi fyritøkur, www.vinnuvitan.biz

Minst tvær av luttakandi fyritøkunum hava ein umsetning sum er omanfyri 15. mió. kr., og samlaði umsetningurin er omanfyri 75. mió. kr. Talan er tí um eina samanlegging, sum skal fráboðast eftir §16, stk. 1 í kappingarlógini.

Tá fullfíggjað fráboðan er latin kappingarmyndugleikanum hevur myndugleikin 30 yrkadagar til at taka eina avgerð um samanleggingin kann góðkennast eftir §15, stk. 5, ella um samanleggingin skal kannast nærri, sbrt. §17, stk. 1 í kappingarlógini.

Kappingareftirlitið kom til ta niðurstøðu, at samanleggingin kundi ikki góðkennast eftir §15, stk. 5 í kappingarlógini, tí marknaðarparturin hjá nýggja felagnum fór at verða oman fyri 25%, og tá kann ikki avvísast, at ein samanlegging kann hindra virknari kapping. Harafturat hevur P/f Poul Hansen, umvegis

[1] retail business

Á og Samkeyp handilsligt samband við áleið **[40-45]**% av marknaðinum fyri gerandisvørur. Omanfyrinevndu horisontalu og vertikalu viðurskifti høvdu við sær, at neyðugt var at kanna samanleggingina nærri.

Tann 22. oktober 2015 vóru tí boð send fráboðara um, at neyðugt var at kanna samanleggingina nærri, sbrt. §17, stk. 1 í kappingarlógini.

## 2.1. Partarnir

**Mynd 2.1A: P/f Poul Hansen, dótturfeløg og atknýtt feløg**




Kelda: Vinnuvitan.biz

**Talva 2.1A: Roknskapartøl fyri P/f Poul Hansen, dótturfeløg, og atknýtt feløg**

| Felag | Ogn | Vinna | Brutto-Vinningur (t.kr.) | Úrslit (t.kr.) | Javnin (t.kr.) | Egin-ogn (t.kr.) |
|---|---|---|---|---|---|---|
| P/f Poul Hansen | 100% | Heilsøla – breitt úrval, | 27.936 | 1.970 | 258.120 | 200.636 |
| Sp/f Trio Import | 100% | | -10 | -8 | 672 | 614 |
| P/f Vitamargarin | 100% | Framleiðsla | 7 | -120 | 2.291 | 2.096 |
| Sp/f Inn-Tórshavn | 100% | Søla av gerandisvørum | 3.704 | 219 | 3.954 | 125 |
| Sp/f Svøðan | 50% | Søla av gerandisvørum | 3.736 | -.675 | 6.391 | -1.197 |
| Sp/f 18.03.2013 | 50% | Søla av gerandisvørum | 1.866 | -960 | 6.008 | -1.102 |
| Sp/f Sunda | 50% | Søla av gerandisvørum | 324 | -1.399 | 5.846 | -1.258 |
| P/f Eurest | 49% | catering | 4.444 | 396 | 1.982 | 1.431 |
| P/f Tera | 33% | | 893 | 347 | 1.487 | 1.298 |

Kelda: Vinnuvitan.biz

**Mynd 2.1.B: Sp/f KSJ, dótturfeløg, og atknýtt feløg**




Kelda: Vinnuvitan.biz

| Felag | Ogn | Vinna | Brutto-Vinningur (t.kr.) | Úrslit (t.kr.) | Javnin (t.kr.) | Egin-ogn (t.kr.) |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Sp/f KSJ | 100% | Móðurfelag | -43 | -1.854 | 2.074 | 1.746 |
| Sp/f 27.09.2013 | 100% | Søla av húsarhaldsvøru | 1.021 | -1.011 | 4.996 | -931 |
| Sp/f Haraldsen | 100% | Søla av húsarhaldsvøru | 4.877 | -930 | 15.187 | 2.875 |
| Sp/f frá 2. August 2006 | 100% | Søla av húsarhaldsvøru | 1.368 | -464 | 1.981 | -1.204 |
| Sp/f 18.03.2013 | 50% | Søla av húsarhaldsvøru | 1.866 | -960 | 6.008 | -1.102 |

## 2.2. Transaktiónin

Samanleggingin verður framd soleiðis, at eitt nýtt felag verður stovnað, P/f undir stovnan, sum keypir handlarnar hjá báðum pørtum. Talan er um hesar handlar: Á við Landavegin, Á við Sundsvegin, Á í Fuglafirði, Á í Vestmanna, Á á Glyvrum og Samkeyp á Toftum. Nýggja felagið keypir yvirhøvur rakstur og ikki handilshølir.

Endamálið við samanleggingini er at fáa effektivari rakstur og at fáa stórrakstur í smásøluna.

Fráboðari metir, at samanleggingin serliga gevur rakstrarfyrimunir innan innkeyp og umsiting, orsakað av at eindin nú gerst størri.

Partarnir hava avtalað, at partapeningurin verður býttur helvt um helvt millum partaeigararnar.

Partarnir hava gjørt ein partaeigarasáttmála. Í honum stendur m.a., at partaeigararnir eru samdir um, at felagið skal keypa vørur frá P/f Poul Hansen. Hetta er tó treytað av at prísir og treytir annars eru kappingarførir við prís og treytir frá øðrum veitarum.

Partarnir hava ásett, undir hvørjum treytum Kristian Suni Haraldsen (KSH) kann taka seg úr samstarvinum. Velur hann í fyrsta lagi at taka seg úr samstarvinum eftir **[...]** árum ella í seinasta lagi eftir **[...]** árum, **[so hevur KSH ein serligan exit-møguleika.]**. Tilsvarandi áseting er ikki sett fyri Høgna Hansen(HH).

Velur KSH at taka seg úr samstarvinum, so er tó tann treytin, at hvørki KSH ella Sp/f KSJ í einum tíðarskeiði upp á **[...]** ár, beinleiðis ella óbeinleiðis, kunna fara í kapping við nýggja felagið. Virksemið hjá Sp/f Haraldsen í Fuglafirði er tó undantikið hesum forboði. Fyrivarni í móti kapping kann sostatt setast í gildi upp til 7 ár frá tí at felagið er stovnað.

HH og KSH fara at manna stjórnina í nýggja felagnum. Sambært stjóraavtalunum skal HH taka sær av umsitingini, meðan KSH tekur sær av tí handilsliga partinum. Í stjórasáttmálanum hjá KSH er ásett enn eitt fyrivarni í móti kapping, sum er 1 ár frá tí at hann gevst í felagnum. Líknandi fyrivarni er ikki sett HH.

Nýggja felagið hevur gjørt eina management-avtalu við P/f Poul Hansen. Sambært avtaluni skal P/f Poul Hansen taka sær av bókhaldi, fíggjarstýring, roknskapi og aðrari umsiting fyri nýggja felagið.

## 2.3. Føroyski marknaðurin fyri gerandisvørur

Hagstova Føroya uppger árliga Brúkaraprístalið, ið er samansett av prísum á vørum og tænastum sum hava serligan týdning fyri húsarhaldið og samfelagið sum heild. Brúkaraprístalið vísir prísstøðið og prísgongd í Føroyum. Ein samanbering millum Brúkaraprístalið og prístal fyri ávísan bólk av vørum í Brúkaraprístalinum avdúkar, um hesin bólkur hálar prístalið upp ella niður. Hetta kann í ávísan mun vera ein ábending um prísstøðið innan bólkin er kappingarført ella ikki. Slík samanbering sigur tó ikki nakað um orsøkina til prísstøðið ella prísgongd.

Brúkaraprístalið inniheldur ein bólk, "Matur og drekka", sum fevnir um vørur, ið eru kjarnin av teimum vørum, sum fyritøkur á marknaðinum fyri gerandisvørur selja. Á myndini niðanfyri sæst Brúkaraprístalið og prístalið fyri bólkin "Matur og drekka" fyri árini 2005 til 2014. Brúkaraprístalið vaks nógv í tíðarskeiðinum 2005 til 2008, men síðani hevur lítil og ongin prísvøkstur verið.

**Mynd 2.3A: Brúkaraprístalið og prístalið fyri bólkin "Matur og drekka" árini 2005-2014**




Kelda: www.norden.org

Sum tað framgongur, so er prístalið fyri bólkin "Matur og drekka" vaksin meira enn brúkaraprístalið í tíðarskeiðinum. So prísirnir á hesum vørum hava yvirhøvur hála brúkaraprístalið upp. Hetta er tó sama gongd sum í Danmark, ið er okkara fremsta samhandilsland, tá tað snýr seg um gerandisvørur.

Á myndini niðanfyri sæst gongdin á prístalinum fyri bólkin "Matur og drekka" í Danmark og Føroyar. Tølini eru frá norden.org, ið hevur ein felags dátugrunn fyri Norðurlond.

**Mynd 2.3B: Prístalið fyri bólkin "Matur og drekka" í Føroyum og Danmark árini 2005-2014**




Kelda: www.norden.org

Sum tað framgongur av myndini so er gongdin í Danmark og Føroyum rættuliga lík fyrstu nógvu árini, meðan seinastu árini er prístalið fyri bólkin "Matur og drekka" vaksin meira í Danmark enn í Føroyum. Danmark er okkara fremsta samhandilsland, tá tað snýr seg um hesar vørur, og tí kunnu hækkandi innflutningsprísir verða ein orsøk til, at prístalið fyri bólkin "Matur og drekka" er hækkað meir enn føroyska Brúkaraprístalið.

Síðani galdandi kappingarlóg var sett í gildi eru tríggjar samanleggingar fráboðaðar og góðkendar, har fyritøkurnar høvdu virksemi á føroyska marknaðinum fyri gerandisvørur.

Í 2011 yvirtók Sp/f Hald handilsvirksemið hjá Sp/f Jóhannes Andreasen, ið hevði ein handil við Grønlandsvegin[2] í Tórshavn. Í 2012 keypti P/f Poul Hansen smápartapeningin í Sp/f Inn í Tórshavn frá Sp/f Svøðuni[3]. Í 2013 yvirtók P/f SMS smápartapeningin í Sp/f Inn á Norðskála[4].

Ongar ábendingar eru um, at hesar góðkenningar hava havt negativt árin á kappingina á marknaðinum. Á myndini niðanfyri sæst lutfalsliga gongdina í Brúkaraprístalinum, umframt prísgongdin fyri bólkin "Matur og drekka". Í báðum føri er talan um broytingar í mun til sama ársfjórðing árið fyri. Reyðu pílarnir á myndini vísa í hvørjum ári og ársfjórðingi áðurnevndu yvirtøkur vóru góðkendar.

[2] Mál nr. 11/00006: Sp/f Hald yvirtekur Sp/f Jóhannes Andreasen
[3] Mál nr. 12/00213: P/f Poul Hansen yvirtekur Sp/f Inn í Tórshavn
[4] Mál nr. 13/00230 P/f SMS yvirtekur Sp/f Inn á Norðskála

Kappingareftirlitið

**Mynd 2.6: Brúkarapristalið. Lutfalslig broyting síðani sama ársfjórðing árið fyri**




Kelda: Hagstova Føroya

Sum tað framgongur so hevur prísgongdin innan bólkin "Matur og drekka" verið støðug og uttan nakra serliga príshækkan í tíðarskeiðinum har samanleggingarnar eru farnar fram. Í 2012 byrjar Brúkarapristalið og prístalið fyri bólkin "Matur og drekka" at falla, men fallið í prístalinum hevur ikki verið líka stórt.

Hagstova Føroya hevur tann 15. juli 2015 eina grein[5] har greitt verður frá prísgongdini seinastu árini. Víst verður á, at høvuðsorsøkin til, at Brúkarapristalið er lækkað seinastu árini er, at rentan á bústaðarlánum og prísurin á brenniolju til húsarhaldið eru lækkað nógv. Hetta eru viðurskifti sum kanska ikki hava stóra ávirkan á tær fyritøkur sum eru á marknaðinum fyri gerandisvørur, og tí hevur prísgongdin á hesum vørum ikki fylgt brúkarapristalinum eins neyvt sum undanfarin ár.

### 2.3.1 Eftirspurningur eftir gerandisvørum

Samlaða sølan av gerandisvørum í Føroyum í 2014 var áleið 976 mió. kr. uttan MVG og onnur avgjøld. Við ársenda 2014 vóru 48.659 íbúgvar í Føroyum. Sostatt var í miðal selt fyri 20.000 kr. til hvønn íbúgva.

Á talvuni niðanfyri sæst fyri hvørja sýslu sær samlað søla, íbúgvaratal, søla fyri hvønn íbúgva og hvussu nógvir handlar eru fyri hvønn íbúgva.

**Talva 2.3.1: Eftirspurningurin eftir gerandisvørum í føroysku sýslunum í 2014**

| Sýslur | Søla (t.kr) | Íbúgvar | Søla /íbúgvar (kr.) | Handlar | Handlar pr. 1000 íbúgvar |
|---|---|---|---|---|---|
| Norðoyar | 104.742 | 5.848 | 17.911 | 5 | 0,85 |
| Eysturoyar | 237.228 | 10.777 | 22.012 | 14 | 1,30 |
| Streymoyar | 464.887 | 23.034 | 20.183 | 18 | 0,78 |

5 Hagstova Føroya (15. juli 2015). Brúkarapristalið er lækkað 1,2 prosent seinasta árið. Er at lesa á http://www.hagstova.fo/fo/tidindi/2015/07/brukarapristalid-er-laekkad-12-prosent-seinasta-arid

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Vága | 59.625 | 3.079 | 19.365 | 4 | 1,30 |
| Sandoyar | 16.217 | 1.274 | 12.729 | 3 | 2,35 |
| Suðuroyar | 93.074 | 4.647 | 20.029 | 7 | 1,51 |
| | **975.773** | **48.659** | **20.053** | **51** | **1,05** |

Kelda: Hagstovan, TAKS, P/f SMS, P/f Poul Hansen, Sp/f P.E, Sp/f Haraldsen

Sum tað framgongur, so er miðal sølan til hvønn íbúgva í Føroyum áleið 20.000 krónur, men samstundis sæst at sølan pr. íbúgva í hvørjari sýslu sveiggjar. Streymoyar, Vága og Suðuroyar sýslur liggja áleið á sama støði sum miðal fyri landið, Eysturoyar sýsla liggur oman fyri miðal, meðan Norðoyar og serliga Sandoyar sýslur liggja nakað niðanfyri.

Verður hugt at talinum av handlum fyri hvørjar 1.000 íbúgvar eru eisini rættuliga stór sveiggj millum sýslurnar. Í Streymoyar sýslu eru 0,78 handlar fyri hvørjar 1.000 íbúgvar, meðan tað eru 2,35 handlar fyri hvørjar 1000 íbúgvar í Sandoynni. Í miðal eru 1,05 handlar fyri hvørjar 1000 íbúgvar í Føroyum.

Verður samanborið við Danmark, so vóru 0,53 handlar pr. 1.000 íbúgvar í Danmark í 2014. Sostatt eru tvífaldað so nógvir handlar fyri hvørjar 1.000 íbúgvar í Føroyum sum í Danmark.[6]

Orsøkin til stóru sveiggini í býtinum av sølu pr. íbúgva kann møguliga standast av keypsvanum hjá fólki. Keypa fólk inn á veg til ella frá arbeiði, hevur tað týdning hvar fólk arbeiða, tí tey vilja velja handlar sum eru á farleiðini millum heimið og arbeiðsplássið. Keypa fólk inn leygardag so hevur búplássið týdning, tí tá vil fjarstøðan frá heiminum hava týdning.

Út frá talvuni omanfyri tykist sum um, at føroyingar yvirhøvur keypa inn á farleiðini millum heimið og arbeiðsplássið. Hetta kann t.d. síggjast við, at sølan fyri hvønn íbúgva í Eysturoynni er væl oman fyri miðal fyri landið, meðan í Norðoyggjum og serliga í Sandoynni er sølan fyri hvønn íbúgva væl lægri enn miðal fyri landið.

### 2.3.2 Útboð av gerandisvørum

Kappingin millum veitarar av gerandisvørum fer fram á fleiri stigum. Yvirskipað er kappingin millum einstøku handilskonseptini. Her verður hugsað um Miklagarð, Bónus, Á, FK, Samkeyp, Mylnuna, Keyp.

Kappingarmyndugleikin hevur tó eisini ein áhuga, í hvussu støðan á marknaðinum er millum áhugamálini handan handilskonseptini, umframt onnur viðurskifti á marknaðinum, t.d. hvussu gongdin er hjá sjálvstøðugu keypmonnunum.

Á myndini niðanfyri sæst býtið á marknaðinum alt eftir um støði verður tikið í handilskonseptinum, áhugamálunum handa konseptið ella millum keypmenn. Øll trý hava týdning fyri virknu kappingina á marknaðinum.

[6] http://dsk.dk/images/pdf_filer/Udviklingen_i_dansk_dagligvarehandel2015.pdf

**Mynd 2.3.2A: Útboð av gerandisvørum í Føroyum**




Kelda: P/f Poul Hansen, P/f SMS, Sp/f P.E, Sp/f Haraldsen og TAKS

Brúkarin hevur sum meginreglu bert áhuga í handilskonseptinum. Brúkarin hevur eina greiða fatan av, hvussu hann/hon raðfestir einstøku handilskonseptini. Hinvegin vil brúkarin ikki hava størri tokka til ein ávísan handil í eini ketu í mun til aðrar í somu ketu. Brúkarin fer ikki at koyra 20 minuttir til ein handil, um ein annar handil við sama handilskonsepti liggur nærri.

Brúkarin hevur eisini eina greiða støðu til støðd á handlum. Nevniliga, at jú størri handilin er, tess longri góðtekur brúkarin at fjarstøðan er. T.v.s. ein brúkari kann velja at keypa inn í einum handli sum er 20 minuttir burtur, hóast ein annar handil er 10 minuttir burtur, men bert um handilin er størri og hevur breiðari úrval av vørum. T.v.s. at størri handlar hava eitt kundagrundarlag sum fevnir um eitt størri landafrøðiligt øki enn smærri handlar[7].

Vanligt er at bólka handlar á marknaðinum í hesar flokkar: Hypermarket, Supermarket, Minimarket, discount[8]. Í nøkrum kanningum eru kioskir íroknaðar bólkin sum hava virksemi innan sølu av gerandisvørum.

Fólkatalið í Føroyum ger, at tað er ikki kundagrundarlag til eitt Hypermarket. Dømi um eitt Hypermarket er Bilka í Danmark. Handlarnir í Føroyum eru í bólkunum Supermarket og Minimarket.

Fyrst í 90'inum kom íslendska felagið Baugur H.F. á føroyska marknaðin við íslendska handilskonseptinum Bónus, ið var eitt discount-konsept. Her hendi tað løgna, at Bónus-konseptið í Føroyum við tíðini fór frá at vera ein discount-handil til eitt Minimarket. Í dag eru ongir discount-handlar í Føroyum. Hetta er ein heldur sermerkt støða, tí í okkara grannalondum hava discount-handlarnir í nógv ár sitið á stórum parti av marknaðinum.

## 2.4. Viðkomandi marknaður

Fyri at staðfesta støðuna hjá nýggja felagnum er neyðugt at skilmarka viðkomandi marknað. Eftir §5 í kappingarlógini skal kanning gerast av eftirspurnings- og útboðsvaraseting. Tað framgongur tó av lógarviðmerkingunum, at myndugleikin ikki er avmarkaður til bert at brúka hesi metingarstøðini.

Fyri at staðfesta viðkomandi marknað verður vanliga ein SSNIP-test brúkt (**S**mall but **S**ignificant and **N**on-transitory **I**ncrease in **P**rice). SSNIP-testin verður brúkt fyri at staðfesta minsta møguliga vøru- og

[7] Competition Commission: The supply of groceries in the UK market investigation, s. 8, 30. Apríl 2008.
[8] Konkurrence- og Forbrugerstyrelsen: Daglivaremarkedet – Konkurrence- ogforbrugeranalyse 06/2011, s. 15

landafrøðiliga marknað, sum ein tilhugsaður monopolistur kann hækka prísin á, uttan at kundarnir rýma til annan veitara.

Í sambandi við munandi príshækking verður vanliga hugsað um príshækkingar á 5%, men tað hevur eisini týdning, hvat slag av vørum talan er um. Gerandisvørur eru vanliga prísviðkvæmar, t.v.s. at ein lutfalsliga lítil príshækking kann hava við sær, at kundin skiftir yvir til aðra vøru. Hinvegin kann hugsast, at vørur sum teldur, klæði, bilar o.a. eru minni prísviðkvæmar, tí her spælir vørumerkið og sosial virðing inn.

Tá tað kemur til skilmarking av marknaðinum fyri gerandisvørur í Føroyum eru ávísar avbjóðingar. Í fyrsta lagi, og sum tað framgongur av parti 2.3.1, so tykist sum føroyski brúkarin keypir fleiri ferðir inn um vikuna. Hetta merkir aloftast, at brúkarin ger síni innkeyp á farleiðini millum arbeiðsplássið og heimið. Hetta er uttan iva orsøkin til, at miðalsølan fyri hvønn íbúgva í Norðoyar og Sandoyar sýslum er minni enn miðal fyri landið, meðan miðal fyri Eysturoyar sýslu er hægri enn miðal fyri landið.

Kappingareftirlitið metir tó, at hetta eigur ikki at innganga í okkara meting av viðkomandi marknaði, tí hetta merkir ikki, at teir brúkarar sum búgva og arbeiða í Norðoyggjum og í Sandoynni vilja skifta, um prísurin har hækkar við 5%. Tvørturímóti verður mett, at tey gjøld sum brúkarin verður álagdur fyri at ferðast frá økinum, ger at ein príshækkan á 5% ikki førir til, at brúkarar í Norðoyggjum og í Sandoynni, sum arbeiða á staðnum, vilja fara úr økinum fyri at keypa inn.

Útboðssíðan er eyðkend við, at talan yvirhøvur er um ketur. Ymiskt er tó, hvussu keturnar eru skipaðar. Í Á, Samkeyp og Keyp er yvirhøvur talan um eitt samstarv millum sjálvstøðugar keypmenn og teirra veitarar. Bónus, Mylnan og Miklagarður hoyra til eitt samtak, P/f SMS, har heilsøla og smásøla eru sameinað. FK er somuleiðis eitt samtak har heilsøla og smásøla eru sameinað, tó er tann munur, at FK er eitt lutafelag, sum hevur sínar røtur í samvinnurørsluni[9].

Hvør handil í FK samtakinum hevur eina limanevnd, sum er umboðað í stjórnini í FK. Endamálið hjá FK er at útvega limunum góðar og óspiltar vørur undir so góðum treytum sum gjørligt. Endamálsorðingin og demokratiski bygnaðurin í FK er eitt eyðkenni fyri fyritøkur sum byggja á samvinnurørsluna.

Útboðssíðan er sostatt sera fjølbroytt, og skuldi hetta alt annað líka verið grundarlag fyri virknari kapping.

### 2.4.1 Viðkomandi vørumarknaður

Tá viðkomandi vørumarknaðurin skal skilmarkast verður funnið fram til tær vørur sum kunnu koma ístaðin fyri vøruna, sum nýggja felagið fer at selja. Í sambandi við hesa samanlegging er tó heldur talan um, hvat vøruúrval sum kann koma ístaðin. Í stuttum kann spyrjast, hvussu breiðan skara av vørusløgum skal ein tilhugsaður monopolistur hava ræði á, áðrenn hesin kann hækka prísirnar munandi, uttan at kundar kunna skifta til aðrar vørur.

Handlarnir hjá nýggja felagnum selja gerandisvørur burturav. Orðið gerandisvøra fevnir um matvørur, drekkivørur, reinsivørur, toilett-vørur, djóravørur og búnýti. Í líknandi málum hevur ES Kommissiónin allýst viðkomandi vørumarknað, sum handlar sum føra eitt breitt úrval av gerandisvørum[10].

Teir handlar sum føra slíkt úrval eru Samkeyp, Á, Keyp, Bónus, FK, og Miklagarður. Umframt hesar verður mett, at Mylnan, ið er ein bakaríketa, hevur eitt sovorðið breitt úrval av gerandisvørum.

---

9 Á donskum: andelsbevægelse

10 COMP/M.3464 -KESKO / ICA / JV, COMP/M.3905 -TESCO / CARREFOUR

Kioskir og bensinsølurnar hjá Magn og Effo hava ikki eitt sovorðið breitt úrval av gerandisvørum at sigast kann, at hesir handlar eru á viðkomandi vørumarknaði. Tær bensinsølur sum eru limir í Samkeyp eru tó á viðkomandi vørumarknaði.

### 2.4.2 Viðkomandi landafrøðiligir marknaðir

Ein landafrøðiligur marknaður er tað økið har nýggja felagið fer at selja sínar vørur. Økið er eyðkent við, at kappingarumstøðurnar eru rættuliga líkar, og at økið líkist frá grannaøkjum við tað, at kappingarligu umstøðurnar har er øðrvísi.

SSNIP-testin verður brúkt til at skilmarka viðkomandi landafrøðiliga marknað. Her verður hugt eftir, hvat minsta møguliga økið er, har ein tilhugsaður monopolistur kann hækka sínar prísir munandi, uttan at kundarnir kunna rýma til aðrar veitarar.

Tá Kappingarmyndugleikar skilmarka landafrøðiliga marknað fyri gerandisvørur, er siðvenja at brúka eina avmarking í koyritíð ella eina avmarking í frástøðu frá handilsstaðnum hjá viðkomandi fyritøku til at staðfesta landafrøðiliga økið.

Í Íslandi hevur Samkeppniseftirlitið síðani 1999 brúkt eina landafrøðiliga skilmarking av marknaðinum fyri gerandisvørur við at seta sum avmarking antin, at brúkarin skal ikki koyra longri enn 20 km til handils, ella at koyra í 20 min. til handils.

Hesin háttur var fyrstu ferð  nýttur, tá ið Baugur hf yvirtók Vöruveltunni hf[11]. Í avgerðini var víst á, at í líknandi málum í útlandinum var skilmarkingin av landafrøðiliga marknaðinum gjørd við støði í teimum handlum sum vóru yvirtiknir. Hetta økið er vanliga skilmarkað sum at liggja innanfyri ein radius á 20 km, ella eitt øki har brúkarin ikki skal brúka meir enn 20 minuttir at ferðast til handilin.

Í avgerðini hjá ES Kommissióni frá 1999 um yvirtøkuna hjá Promodes av Catteau var marknaðurin fyri gerandisvørur skilmarkaður landafrøðiliga, sum eitt øki upp á 10-30 minuttir koyring frá teimum yvirtiknu handlunum hjá Etablissement Catteau[12]. Men víst verður eisini á, at onnur viðurskifti gera seg galdandi, so sum keypsvanar, úrval og handilsligir fasilitietir o.s.fr.

Í avgerðini hjá ES Kommissiónini frá 2004 um stovnanina av samváða millum Kesko og ICA[13] var gerandisvørumarknaðurin skilmarkaður landafrøðiliga, sum eitt øki sum lá 10-30 minuttir koyritíð frá handlunum hjá samváðanum.

Í avgerðini hjá ES Kommissiónini frá 2007 um yvirtøkuna hjá REWE av Delvita, var viðkomandi gerandisvørumarknaður skilmarkaður landafrøðiliga sum eitt øki sum lá 20-30 minuttir koyring frá handlunum hjá Delvita[14].

Kappingareftirlitið hevur valt at brúka eina skilmarking, sum tekur støði í omanfyri nevndu siðvenju, soleiðis, at viðkomandi marknaður verður mettur at liggja innanfyri eitt øki, sum svarar til 20-30 minuttir í bili til handlarnar hjá nýggja felagnum. Tó við teirri avmarking, at økir hvørs farleið til handlar hjá nýggja felagnum er áløgd alment gjald, eru ikki at meta sum partar av viðkomandi landafrøðiliga marknaði.

Við støði í SSNIP-testini er Kappingareftirlitið komið til, at tveir viðkomandi landafrøðiligir marknaðir eru. Hesir eru:

---

11 Yfirtaka Baugs HF á Vöruveltunni hf., Ákvörðun nr. 18/1999
12 Comp/ M.1085 Promodes/Catteau
13 COMP/M.3464 -KESKO / ICA / JV
14 COMP/M.4590 -REWE / DELVITA

1. Eysturoyggin og eystursíðan av Norðurstreymoy
2. Suðurstreymoy og vestursíðan av Norðurstreymoy.

### 2.4.3. Eysturoyggin og eystursíðan av Norðurstreymoy

Nýggja felagið fer at hava handlar í Fuglafirði, Glyvrum, Toftum, umframt at P/f Poul Hansen eigur helmingin av partapeninginum í Sp/f Sunda, sum rekur Á-handilin við Norðskála.

Verður støði tikið í handlinum í Fuglafirði, so eru 16 km út á Glyvrar har næsti handilin hjá nýggja felagnum er. T.v.s. umleið 12-15 min. í bili. Av Glyvrum út á Toftir eru bert 3-5 min. í bili, har enn ein handil er hjá nýggja felagnum. Av Toftum út á Nes eru somuleiðis bert fáir minuttir.




Av Glyvrum til Norðskála eru 18-20 minuttir við bili, og av Glyvrum til Kolbeinagjáar eru eisini undir 20 min. Bygdirnar Morskranes og Selatrað liggja meir enn 20 min. frá handlinum á Glyvrum, men tó minni enn 30 min.

Frá Norðskála eru 10-12 min. til Eiðis. Frá Norðskála eru undir 20 min. til Funnings og Gjáar. Frá Norðskála til Kollafjarðar er farleiðin 12-13 min. í bili, meðan farleiðin frá Norðskála til Hoyvíkar er áleið 35-40 min. í bili. Mett verður tó, at markið fyri, hvussu langt suður marknaðurin gongur eigur at verða lagt við Hósvík, tí her er valið millum ein minni handil í Kollafirði og tveir størri handlar við Norðskála.

Á myndini til høgru síggjast marknaðarpartarnir á hesum marknaði eftir samanleggingina. Sum tað framgongur av myndini, fer nýggja felagið at hava ein marknaðarpart á **[35-40]**%, og verður sostatt størsta felagið á marknaðinum. Verður samstundis hugt at vinnuligum sambondum, so sæst, at P/f Poul Hansen hevur, umvegis sølusamstørvini Samkeyp og Á, samband við **[60-85]**% av marknaðinum.




Áðrenn samanleggingina var Herfindahl indeksið 1.898, meðan eftir samanleggingina verður Herfindahl indeksið 2.174. Hetta merkir at broytingin (Delta) er 276.

### 2.4.4. Suðurstreymoy og vestari partur av Norðurstreymoy

Nýggja felagið fer at hava handlar í Tórshavn og í Vestmanna. Verður støði tikið í handlunum í Vestmanna, so er farleiðin til Kollafjarðar 16-17 min. í bili, meðan farleiðin úr Vestmanna til Hoyvíkar er 30 min. í bili. Úr Hoyvík eru bert fáir minuttir í bili til Tórshavnar har nýggja felagið hevur tveir handlar.




Á myndini til høgru síggjast markndðarpartarnir á hesum marknaði eftir at samanleggingin er framd.

Sum tað framgongur av myndini omanfyri, so fer nýggja felagið at hava ein marknaðarpart á **[10-15]**%. Í hesum sambandi kann vísast á, at P/f SMS er størst á marknaðinum við **[40-50]**% og FK er næststørst við **[20-25]**%. Verður samstundis hugt at vinnuligum sambondum, so sæst at P/f Poul Hansen hevur, umvegis sølusamstørvini Samkeyp og Á, samband við **[25-50]**% av marknaðinum.

Áðrenn samanleggingina var Herfindahl indeksið 3020, meðan eftir samanleggingina verður Herfindahl indeksið 3107. Hetta merkir at broytingin er 87.




## 2.5. Ávirkaðir marknaðir

P/f Poul Hansen hevur sítt høvuðsvirksemi innan heilsølu av húsarhaldsvørum. Hetta er ein ovari[15] marknaður til teir marknaðir, sum nýggja felagið fer at hava sítt virksemi á.

Á føroyska heilsølumarknaðinum eru fimm størri heilsølur. Umframt hesar hava heilsølurnar Dagrofa og Coop og REMA 1000 virksemi umvegis ávikavist P/F SMS, FK og Arctic Import A/s.

Marknaðarpartarnir á føroyska heilsølumarknaðinum fyri húsarhaldsvørur síggjast niðanfyri. Marknaðarpartarnir byggja á metingar hjá fráboðara og Kappingareftirlitinum.

---

[15] Up-stream




Sum tað framgongur omanfyri, so kemur rættuliga nógv vøra beinleiðis frá útlendskum heilsølum, og kemur hetta fyrst og fremst av, at eindirnar á føroyska marknaðinum eru blivnar størri, og flutnings-møguleikarnir til og úr Føroyum eru munandi betri enn fyri 20-30 árum síðani. Útlendsku heilsølurnar sita á **[40-45]%** av marknaðinum, meðan P/f Poul Hansen situr á **[30-35]**% og triðistørstur er P/f Poul Michelsen við **[15-20]**%. HHI fyri henda marknað er 3352, sum er stór miðsavning.

## 2.6. Aðrar bindingar á marknaðinum

Tað eru tríggjar ketur á marknaðinum – Á, Samkeyp og Keyp. Fyri allar er galdandi, at talan er um samstarv millum eina heilsølu og sjálvstøðugar handlar um felags marknaðarføring og sølu av teimum gerandisvørum, sum heilsølan førir. Keturnar eru eitt aftursvar til ta marknaðarføring, sum tær størri fyritøkurnar, FK og P/f SMS, føra. Við at inganga í tílík samstørv fáa smærri keypmenn møguleika at hava eina kappingarføra marknaðarføring. Fyri heilsølur er tað ein máti at tryggja sær eitt sølugrundarlag, tí gongdin er hon, at alt fleiri vørur verða innfluttar uttan um heilsølurnar.

### 2.6.1 Samkeyp

Samkeyp virkar soleiðis, at ein nevnd verður vald, sum skal leggja sølutiltøkini til rættis fyri Samkeyp. Talan er um eina fýramanna nevnd, har keypmenninir velja trý umboð, og P/f Poul Hansen velur 1 umboð. Umboðið hjá P/f Poul Hansen er formaður í nevndini. Nevndin situr í tvey ár. Ketur kunna bara velja eitt umboð. Hetta merkir, at Sp/f PE og Sp/f Haraldsen, sum eiga fleiri handlar, hava bert eina atkvøðu.

Kravið fyri at kunna luttaka í Samkeyp er, at handilin keypir fyri minst 1,5 mió. kr. frá P/f Poul Hansen, og at minst 60% av samlaðu vørusøluni hjá keypmanninum er frá P/f Poul Hansen. Harumframt binda keypmenninir seg til at hava Samkeyps-merki á handlinum og at hava tilboðsvøruna á goymslu. Samkeyps-prísskelti skulu setast á allar tilboðsvørur og takast burtur, tá í tilboðini er av.

Keypmennirnir gjalda eitt árlig gjald fyri at luttaka í Samkeyp. Gjaldið verður ásett á aðalfundinum.

Søluavísir verða bornar út í teimum økjum, har Samkeyps-handlar eru.

Kappingareftirlitið

### 2.6.2 Á

Á samstarvið var byrjað av størru handlunum í Samkeyp og P/f Poul Hansen. Ynskið við Á samstarvinum var at kunna hava fleiri tilboð og fleiri ferðir um vikuna.

Á handlarnir hava eisini eina nevnd sum leggur til rættis øll sølutiltøk.

Handlarnir sum eru við í Á skulu hava eina ávísa støðd og eitt ávíst úrval av vørum. Serliga er krav um, at handlarnir skulu hava eitt gott og breitt úrval av frukt og grønmeti.

Tað er ongin binding og ongi krøv til keyp frá P/f Poul Hansen.

### 2.6.3 Keyp

Keyp samstarvið er millum felagið Arctic Import A/s[16] og handlarnar Eldhús á Sandi, CAJ í Kollafjørði, og Strandacentrum á Strondum.

Samstarvið fer fram soleiðis, at Arctic Import A/s bindur seg til at gera tilboðsbløð á ávikavist 4, 8 og 12 síður. Kostnaðirnir av at gera tilboðsblaðið verða býttir javnt millum teir luttakandi keypmenninar og Arctic Import.

Partarnir binda seg í 36 mánaðir at luttaka í Keyp, og báðir partar hava eina uppsagnarfreist upp á 12 mánaðir.

Keypmenninir binda seg ikki til at keypa eina ávísa nøgd, men sagt verður, at tann einstaki keypmaðurin skal alla tíðina royna at keypa so stóran part av samlaða keypinum frá Arctic Import sum er møguligt. Kundin skal tó í avtalutíðarskeiðinum bert føra privat label vørur sum eru keyptar frá Arctic Import.

[16] Arctic Import A/S hevur stórt heilsøluvirksemi í Grønlandi og eigur eisini fimm handlar sum selja húsarhaldsvørur í Grønlandi. Arctic Import A/S eigur eisini 48% av føroyska felagnum Blika.

## 3. Meting

Endamálið við samanleggingareftirlitinum er at hindra, at samanleggingar verða framdar sum beina burtur ella avmarka teir ágóðar, sum virkin kapping førir við sær.

Metingarstøðið fyri nær ein samanlegging kann góðkennast, og nær hon skal sýtast er at finna í §15, stk. 2, ið sigur:

> "Stk. 2. 1 Ein samanlegging, sum ikki munandi forðar fyri virknari kapping, serliga við at skapa ella styrkja eina ráðandi marknaðarstøðu, skal góðkennast. Ein samanlegging, sum munandi forðar fyri virknari kapping, serliga við at skapa ella styrkja eina ráðandi marknaðarstøðu, skal forbjóðast."

Hetta er SIEC-testin, ið verður brúkt sum metingarstøði í øllum løgdømum sum hava kappingarreglur úr ES. Eftir SIEC-testini skal ein samanlegging forbjóðast, um hon fer at forða fyri virknari kapping. Ein av orsøkunum til, at ein samanlegging kann forða fyri virknari kapping er, um ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkist, men hetta er ikki einasta orsøkin, sum kann hava við sær, at virkna kappingin verður forðað.

Í sambandi við hesa samanlegging eru fleiri viðurskifti sum spæla inn. P/f Poul Hansen situr á einum stórum parti av heilsøluni av gerandisvørum í Føroyum. Somuleiðis hevur P/f Poul Hansen sølusamstarv við flestu sjálvstøðugar keypmenn í Føroyum. Aftaná hesa samanlegging fer P/f Poul Hansen at hava størri handilslig áhugamál í smásøluni í Føroyum.

Neyðugt er tí at kanna bæði horisontala og vertikala virknaðin av samanleggingini fyri at staðfesta um samanleggingin kann avmarka virknu kappingina. Samanleggingin hevur eisini aðrar atknýttar avmarkingar við sær, sum støða skal takast til.

Í sambandi við seinastu lógarbroytingina í kappingarlógini var ásett í viðmerkingini til §15, stk. 2 , at ES fráboðan nr. 139/2004[17], ES vegleiðing um horisontalar samanleggingar[18], ES vegleiðing um ikki-horisontalar samanleggingar[19], ES vegleiðing um atknýttar avmarkingar[20], og ES siðvenja annars fór at verða vegleiðandi fyri, hvussu Kappingarráðið fór at brúka greinina. Sama var ásett í viðmerkingini til §13 um ES fráboðan nr. 139/2004 og ES vegleiðing um jurisdikatión í sambandi við fráboðan nr. 139/2004[21].

Í parti 3.1 verður meting gjørd av horisontalu viðurskiftunum, í parti 3.2 verða vertikalu viðurskiftini viðgjørd, í parti 3.3 verða atknýttu avmarkingarnar viðgjørdar, og at enda verður í 3.4 ein samlað meting gjørd.

---

[17] Council Regulation no 139/2004 of 20 January 2004 on the control of concentrations between undertakings
[18] EU Guidelines on the assessment of horizontal mergers under the Council Regulation on the control of concentrations between undertakings, 2004, O.J. C31/03
[19] EU Guidelines on the assessment of non-horizontal mergers under the Council Regulation on the control of concentrations between undertakings, 2008, O.J. C265/07
[20] EU Commission Notice on restrictions directly related and necessary to concentrations, 2005, O.J. C56/03
[21] EU Commission Consolidated Jurisdictional Notice under Council Regulation No 139/2004 on the control of concentrations between undertakings, 2008, O.J, C95/01

## 3.1. Horisontal viðurskifti

Tá kappingarneytar leggja saman er talan um eina horisontala samanlegging. Í hesum føri er talan um eina samanlegging har smásøla av gerandisvørum hjá tveimum feløgum verður løgd í eitt og sama felag.

Avleiðingin av horisontalum samanleggingum er, at tað kappingarliga trýst sum hevur verið millum kappingarneytar hvørvur, umframt at miðsavningin økist. Trupulleikar kunna bæði standast av, at samanlagda fyritøkan verður marknaðarráðandi og harvið kann skaða kappingina, og at samanleggingin broytir fyritreytirnar fyri, hvussu kappingin verður frameftir.

Tí verður hugt bæði eftir, um ein samanlegging skapar ella styrkir eina marknaðarráðandi støðu, men eisini um økta miðsavningin kann hava við sær at virkna kappingin verður avmarkað.

Í ES vegleiðingini um horisontalar samanleggingar eru ásett mørk fyri nær ein samanlegging kann hugsast at skapa ella styrkja eina marknaðarráðandi støða. Somuleiðis eru nøkur mørk fyri nær ein samanlegging kann hugast at skapa eina miðsavning sum fer at skaða virknu kappingina.

Í vegleiðingini verður víst á, at um samanløgdu feløgini fáa ein marknaðarpart á 50%, so er hetta í sær sjálvum eitt greitt tekin um, at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkt. Er marknaðarparturin millum 40-50%, og enntá undir 40%, kann hetta vera tekin um, at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkist, um tað eru onnur viðurskifti sum stuðla hesum. T.d. tal av kappingarneytum, teirra styrki, ella at vørurnar hjá samanløgdu fyritøkunum eru rættuliga líkar.

Hinvegin vísir ES Kommissiónin á, at ein marknaðarpartur undir 25% er greið ábending um, at ein samanlegging ikki kann hindra kappingini.

Viðvíkjandi miðsavning verður í vegleiðingini, víst á, at um Herfindahl indeksi (HHI) eru undir 1.000, ella millum 1.000 og 2.000 og broytingin (Delta) er undir 250, ella HHI er omanfyri 2.000 men Delta er undir 150 vil miðsavningin ikki verða ein trupulleiki, uttan so at tað eru onnur viðurskifti sum kunna stuðla undir at miðsavningin gerst ein trupulleiki.




| 7 % broyting | C1 | C2 | C3 | C4 | C5 | C6 | C7 | C8 | C9 | C10 | HHI | Delta |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Eftir | 20 | 0 | 20 | 0 | 20 | 0 | 20 | 0 | 20 | 0 | 2.000 | |
| Áðrenn | 18 | 2 | 18 | 2 | 19 | 1 | 19 | 1 | 19 | 1 | 1.742 | 258 |
| Eftir | 12 | 8 | 12 | 8 | 11 | 9 | 11 | 9 | 11 | 9 | 1.022 | |
| Áðrenn | 10 | 10 | 10 | 10 | 10 | 10 | 10 | 10 | 10 | 10 | 1.000 | 22 |

Sambandið millum marknaðarpart , HHI og Delta er soleiðis, at tess størri HHI er, tess størri gerst Delta við somu broyting í marknaðarparti. Hetta vísir talvan til høgru. Ein samlað broyting av marknaðarpørtum á 7%, har HHI fer úr 1742 uppí 2000 gevur eitt Delta á 258, meðan ein tilsvarandi broyting har HHI fer úr 1000 uppí 1022 gevur eitt Delta á 22.

Sambært vegleiðingini eru tað yvirskipað tveir mátar ein horisontal samanlegging kann hindra kappingini á marknaðinum.

1. **Einsæris árin**, sum hóast tey ikki skapa ella økja um møguleikan fyri samskipan á marknaðinum, kann hava við sær, at virkna kappingin verður hindrað(Unilateral effects).

Ein samanlegging kann hava tílík neilig árin á kappingina, tí tað trýst sum fyritøkur umvegis kappingina leggja á hvørja aðra minkar ella hvørvur. Eitt ítøkiligt dømi er, tá ið ein fyritøkur leggur saman við sín størsta kappingarneyta. Áðrenn samanleggingina vildu flestu kundar farið yvir til kappingarneytan, um fyritøkan hækkaði sínar prísir munandi. Eftir samanleggingina er hesin møguleiki ikki tilstaðar, og tí kann samanlagda fyritøkan møguliga hækka sínar prísir og framvegis økja sín vinning.

ES Kommissiónin hevur víst á ávís viðurskifti, sum kunnu hava ávirkan á, um einsæris árin av samanleggingini kunnu fáa neiliga ávirkan á kappingina. Í pørtunum 3.1.1-3.1.6 verða hesi viðurskifti viðgjørd við atliti til hesa samanlegging.

2. **Samskipað árin** skapa ella økja um møguleikan fyri, at tigandi samskipan kann fara fram á marknaðinum, ella lætta um eina tigandi samskipan sum longu fer fram (Coordinated effects).

   Tá ið miðsavningin á einum marknaði er stór, kann tað í ávísum førum løna seg fyri fyritøkur at hava eina framferð á marknaðinum, sum eina og aleina hevur til endamáls at hækka søluprísirnar á marknaðinum.

   Tá ein samanlegging fer fram á einum marknaði sum longu hevur stóra miðsavning, so eru størri sannlíkindi fyri, at fyritøkurnar megna at samskipa sína framferð á marknaðinum.

   ES Kommissiónin hevur víst á ávís viðurskifti sum kunnu hava ávirkan á, um tað letur seg gera hjá fyritøkum at samskipa sín atburð. Í pørtunum 3.1.7-3.1.10 verða hesi viðurskifti viðgjørd við atliti til hesa samanlegging.

### 3.1.1. Luttakandi feløgini hava stórar marknaðarpartar á viðkomandi marknaði

Tess størri marknaðarpart ein fyritøka hevur, tess størri eru sannlíkindi fyri, at fyritøkan hevur marknaðarvald, og tess meira samanleggingin økir um marknaðarpartin, tess størri eru sannlíkindini fyri, at fyritøkan fær størri marknaðarvald.

Somuleiðis er galdandi, at tess størri sølugrundarlagið er, tess størri eru sannlíkindini fyri, at ein prísshækkan vil verða lønandi fyri fyritøkuna, hóast seldu nøgdirnar minka.

Nýggja felagið, umframt eigararnir, fara at sita á **[10-15]**% av føroyska marknaðinum fyri gerandisvørur. Men Kappingareftirlitið er komið fram til, at tað eru fleiri landafrøðiligir marknaðir fyri gerandisvørur í Føroyum, og er komið fram til at nýggja felagið, umframt at ein av eigarunum, fara at hava virksemi á tveimum av hesum marknaðum.

Á einum av hesum marknaði, Eysturoyggin - íroknað eystursíðuna av Norðurstreymoy - fer nýggja felagið, at hava ein marknaðarpart á **[35-40]**%. Sambært ES vegleiðingini um horisontalar samanleggingar, so er ein marknaðarpartur á **[35-40]**% ikki í sær sjálvum tekin um, at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkist. Somuleiðis skal vísast á, at bert marknaðarpartar undir 25% kunna í sær sjálvum verða tekin um, at ongin marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkt.

Á hinum marknaðinum, Suðurstreymoy og vestari partur av Norðurstreymoy, fer nýggja felagið bert at hava **[10-15]**% av marknaðinum.

Í sambandi við hesa samanlegging fer HHI fyri marknaðin í Eysturoynni v.m. úr 1.898 upp í 2.174, og t.v.s. at broytingin er 276. Sambært áðurnevndu vegleiðing frá ES Kommissiónini so førir samanleggingin við sær, at marknaðurin í Eysturoynni fer frá at vera moderat miðsavnaður til at hava stóra miðsavning.

Harumframt er broytingin í HHI á einum støði, sum sambært ES Kommissiónini er tekin um, at broytingin kann skapa ella styrkja eina marknaðarráðandi støðu.

Fyri viðkomandi marknaðin í Suðurstreymoy v.m. er talan um ein marknað við stórari miðsavning. Samanlegging hevur við sær, at HHI fer úr 3.020 upp á 3.107, men broytingin er bara 87. Sambært vegleiðingini frá ES Kommissiónini, so er talan um eina broyting, sum ikki gevur ábendingar um, at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkist.

### 3.1.2 Luttakandi fyritøkurnar eru nærmastu kappingarneytar

Ofta er tað so, at ávísar vørur kunnu í størri mun enn aðrar koma í staðin fyri eina vøru. Tí er galdandi, at í tess størri mun vørurnar hjá eini av luttakandi fyritøkunum kunna koma ístaðin fyri vørurnar hjá hinum luttakandi fyritøkunum, tess meira sannlíkt er; at samanlagda fyritøkan vil hækka sínar prísir. Hetta kemur av teirri orsøk, at tess lættari vørur kunna koma ístaðin fyri hvørja aðra, tess størri kappingarligt trýst leggja tær á hvørja aðra.

Kappingareftirlitið metir, at hesi viðurskifti hava ongan týdning í sambandi við hesa samanlegging. Kappingareftirlitið metir, at innan gerandisvørur kann vøruúrvalið hjá øllum kappingarneytum koma ístaðin fyri vørurnar hjá samanlagda felagnum.

### 3.1.3 Kundarnir hava avmarkaðar møguleikar at skifta veitara

Í ávísum førum kann ein samanlegging gera, at kundarnir hava torført við at skifta veitara. Í sambandi við hetta mál kundi tað verið, um bert fáir aðrir veitarar vóru á viðkomandi marknaði.

Kappingareftirlitið metir, at á báðum marknaðum eru góðir møguleikar til at skifta veitara. Kundarnir hava møguleika til at skifta til veitarar innan fyri Á-ketuna og til aðrar ketur, sum luttakandi fyritøkurnar ikki hava ávirkan á.

Kappingareftirlitið metir tí, at hesi viðurskifti hava ongan týdning í sambandi við hesa samanlegging.

### 3.1.4 Kappingarneytarnir fara ikki at økja útboðið um prísstøðið hækkar

Í ávísum førum kann støðan á marknaðinum verða soleiðis, at kappingarneytarnir hava nátt síni kapasitetsmørk, og at teir tí ikki uttan víðari kunnu økja útboðið um luttakandi fyritøkurnar hækka sínar prísir.

Undir tílíkum umstøðum er vandi fyri, at samanlagda fyritøkan fer at avmarka sítt útboð til eitt støði, sum liggur undir tí útboði, sum luttakandi fyritøkurnar høvdu áðrenn samanleggingina, fyri á tann hátt at hækka prísstøðið.

Kappingareftirlitið metir, at støðan er soleiðis á marknaðinum, at verandi fyritøkur á marknaðinum lættliga kunnu økja sítt útboð. Umframt at tað ikki er serliga kostnaðarmikið hjá nýggjum at koma inn á marknaðin. Fráboðari hevur mett, at tað krevur eini leigaði hølir og 4 mió. kr. í innbúgv, umframt at rakstur og goymsla skulu fíggjast. Fráboðari sigur somuleiðis, at break-even er áleið 20 mió. kr.

Kappingareftirlitið metir, at hesi viðurskifti hava ein ávísan týdning í sambandi við hesa samanlegging, men ikki í serliga stóran mun.

### 3.1.5 Samanlagda fyritøkan er før fyri at hindra kappingarneytunum í at víðka sítt virksemi

Fær samanlagda fyritøkan eina marknaðarráðandi støðu kann fyritøkan fáa møguleika, og hava insitament til at hindra kappingarneytum í at víðka sítt virksemi.

Í tílíkum føri hvørvur kappingarliga trýstið frá kappingarneytunum. Hetta kann verða støða um t.d. samanlagda felagið hevur stóra ávirkan á útboðið á grundleggjandi inntakið á viðkomandi marknaði, ella á distributiónina á viðkomandi marknaðum.

Kappingareftirlitið metir, at innan sølu av húsarhaldsvørum kann tílík støða ikki uppstanda, tí tað eru fleiri fyritøkur á marknaðinum sum hava bæði heilsølu og detailsølu innanhýsis, umframt at tað eru heilsølur í Føroyum sum kunnu víðka sítt virksemi.

Kappingareftirlitið metir tí, at hesi viðurskifti hava ongan týdning í sambandi við hesa samanlegging.

### 3.1.6 Samanleggingin beinir burtur eina týðandi orsøk/keldu til virknu kappingina

Nakrar fyritøkur hava størri ávirkan á kappingina enn teirra marknaðarpartar gevur ábending um. Talan kann vera um eina nýggja fyritøku, sum er í gongd við at skapa sítt grundarlag, ella eina fyritøku sum rekur sítt virksemi á ein annan hátt enn siðvenja er á marknaðinum.

Í tílíkum føri kann ein samanlegging, hóast broytingin í HHI er avmarkað, hava stórt árin á kappingina á marknaðinum, við tað at tað kappingarliga trýst sum henda fyritøkan skapar hvørvur.

Í hesum sambandi er talan um eina samanlegging, har luttakandi feløgini frammanundan hava eitt sølusamstarv umvegis Á og Samkeyp. Framferðin hjá teimum handlum, sum nýggja felagið fer at reka, fer tí neyvan at broytast stórvegis eftir at samanleggingin er farin fram. Handlarnir fara framvegis at verða Á og Samkeyps-handlar.

Kappingareftirlitið metir tí, at hesi viðurskifti hava ognan týdning í sambandi við hesa samanlegging.

### 3.1.7. Áseting av treytum fyri samskipan

Sannlíkindi fyri at samskipan kann fara fram er størst, um kappingarneytar lætt kunna koma fram til eina felags fatan av, hvussu samskipanin skal fara fram. Luttakararnir skula hava eina felags fatan av, hvat er í tráð við samskipanina og hvat ikki er í tráð við hana.

Í hesum sambandi hevur tað týdning hvussu nógvar fyritøkur eru á marknaðin, hvussu nógvar vørur talan er um, hvussu eins fyritøkurnar eru, hvussu eins kundarnir eru, og um talan er um støðugan eftirspurning.

Kappingareftirlitið metir; at tað er ikki lætt at byrja eina samskipan á hesum marknaði. Tað eru lutfalsliga nógvar fyritøkur á hesum marknaði, og tær eru sera ymiskar, tá tað kemur til kostnaðarstruktur, konsept, og marknaðarpart. Somuleiðis eru tvær sum eru vertikalt skipaðar, meðan restin er ikki. Vøruúrvalið er eisini stórt og fjøltáttað, og er hetta eisini ein avbjóðing í sambandi við samskipan. Tað sum talar fyri, at ein samskipan kann eydnast er, at talan er um støðugan eftirspurning, og at kundarnir eru eins.

### 3.1.8 Eftirlit við frávikum

Í sambandi við samskipan vil tað altíð vera freistandi fyri einstøku fyritøkuna at víkja frá teimum treytum sum samskipað er um, og harvið at fáa størri vinning. Bert hóttan um aftursvar ger, at fyritøkurnar halda seg til tær óskrivaðu treytirnar fyri samskipanina.

Tað er tí neyðugt, at marknaðirnir eru gjøgnumskygdir, soleiðis at fyritøkurnar kunna eygleiða hvørja aðra. Gjøgnumskygni er m.a. treytað av tali av fyritøkum, men eisini hvussu transaktiónirnar fara fram. Um talan er um fáar transaktiónir og kanska almennar transaktiónir, t.d. í sambandi við útboð, so er lætt at staðfesta frávik.

Kappingareftirlitið metir, at marknaðurin fyri smásølu av gerandisvørum hevur avmarkað gjøgnumskygni. Tað eru nógvar transaktiónir hvønn dag, og talan er um eitt breitt vøruúrval. Tilboðsbløðini og lýsingar annars eru einasta innlitið, sum fyritøkurnar hava í viðurskiftini hjá hvørji aðrari.

Tað skal tó viðmerkjast, at ein av luttakandi fyritøkunum, P/f Poul Hansen, selur umleið helmingin av øllum vørum sum Á og Samkeyps handlarnir selja. Hesir handlar sita á **[40-50]**% av føroyska

marknaðinum fyri gerandisvørum. Eftir samanleggingina fer P/f Poul Hansen at sita á **[10-15]**% av føroyska marknaðinum fyri gerandisvørum. Tað má tí metast, at P/f Poul Hansen fer at hava gott innlit í, hvussu lønsemið er í smásøluni í Føroyum.

### 3.1.9 Straffur fyri frávik

Ein samskipan er ikki lív lagað, um frávik ikki verða revsað nóg væl. Uttan revsing vilja fyritøkurnar altíð vinna mest, tá tær bróta treytirnar fyri samskipanini.

Tí skal hóttanin um hevndaratsókn hava eitt ávíst trúvirði. Tað sum gevur hevndaratsókini trúvirði er m.a. hvørjar møguleikar hinar fyritøkurnar hava at fremja hevnd, hvat tað kostar hinum fyritøkunum at seta hana í verk, samanborið við hvør vinningur fast burturúr, at fáa tann í rætt, sum hevur framt frávikið.

Kappingareftirlitið metir, at ein av luttakandi fyritøkum hevur møguleika í ávísan mun at reka í rætt. P/f Poul Hansen kann siga upp samstarvsavtalur við handlar, men tað eru aðrar heilsølur á marknaðinum sum veita eitt breitt úrval av gerandisvørum. Somuleiðis er nýggj keta komin inn á marknaðin seinastu 3 árini, og tí hava sjálvstøðugu handlarnir eitt alternativ til P/f Poul Hansen. At enda er ein munandi partur av marknaðinum meir ella minni leysur av P/f Poul Hansen.

Kappingareftirlitið metir tí, at møguleikin fyri at straffa frávik eru avmarkaður.

### 3.1.10 Reaktión frá øðrum fyritøkum

Fyri at ein samskipan skal eydnast er neyðugt, at tað ikki eru aðrar fyritøkur uttan fyri samskipanina, sum kunna forkoma samskipanini.

Í hesum sambandi skal vísast á, at tvær aðrar fyritøkur eru á marknaðinum sum eru vertikalt skipaðar, og eru tí meir ella minni leysar av P/f Poul Hansen. Harumframt er nýggj heilsøla komin inn á føroyska marknaðin, sum er í gongd við at skapa sær eitt grundarlag.

**Ávegis niðurstøða**

**Einsæris árin:** Samanleggingin førir við sær, at nýggja felagið fær stóran marknaðarpart á einum av tveimum marknaðum. Marknaðarparturin er omanfyri tað mark(**sí 3.1**) sum vanliga verður mett, at verða uttan trupulleikar fyri kappingina.

Kappingareftirlitið hevur tí kannað, um einsæris árin (unilateral effects) kunna skaða virknu kappingina á marknaðinum. Hugt er eftir um umstøður eru til staðar sum kunna hava við sær, at einsæris árin kunna avmarka kappingina(**sí 3.1.1-3.16**).

Kappingareftirlitið metir at hesar umstøður eru ikki til staðar í hesi samanlegging.

**Samskipað árin:** Samanleggingin førir við sær at miðsavningin á báðum marknaðum økist, men serliga á tí eina marknaðinum fer ein munandi broyting fram. Miðsavningin og broytingin á hesum eina marknaði er omanfyri tey mørk(**sí 3.1**) sum vanliga verður mett, at verða uttan trupulleikar fyri kappingina.

Kappingareftirlitið hevur tí kannað um samskipað árin (coordinated effects) kunna skaða virknu kappingina á marknaðinum. Hugt er eftir um umstøður eru til staðar sum kunna hava við sær, at ein samskipan kann fara fram(**sí 3.1.7-3.10**).

Kappingareftirlitið metir at hesar umstøður eru ikki til staðar í hesi samanlegging.

## 3.2 Vertikal viðurskifti

Undir bólkin ikki-horisontalar samanleggingar koma vertikalar samanleggingar og konglomerat samanleggingar. Í sambandi við hesa samanlegging hevur tað týdning at viðgera tey viðurskifti sum snúgva seg um vertikalar samanleggingar, tí P/f Poul Hansen hevur heilsøluvirksemi og hevur felagsræði á nýggja felagnum.

Ein vertikal samanlegging fer fram millum eina fyritøka á einum ovara marknaði (up-stream market) og eina fyritøku á einum niðara marknaði (down-stream market). Talan er sostatt um, at seljari og keypari leggja saman.

Samanleggingar sum ikki eru millum kappingarneytar skapa sjáldan trupulleikar, eisini tá talan er um vertikalar samanleggingar.

Í fyrsta lagi hvørvur onki kappingarligt trýst, tá seljari og keypari leggja saman. Í øðrum lagi er endamálið við vertikalum samanleggingar ofta at fáa betur rakstur, sum síðani ofta kann føra til økta kapping. Rakstrar fyrimunir kunna vera, at transaktiónskostnaðurin lækkar, umframt at samskipan av sølu, innkeypi og stýring av goymslu gerst betri.

Hesir fyrimunir kunnu koma brúkarum á niðara marknað til góðar, tí ein príslækking kann ofta loysa seg betur hjá eini vertikalt skipaðari fyritøku, enn einari fyritøku sum bara hevur virksemi á niðara marknaði. Orsøkin til hetta er, at økti eftirspurningurin kemur vertikalt skipaðari fyritøkuni til góðar á bæði ovara og niðara marknaði.

Sambært vegleiðingini um ikki-horisontalar samanleggingar vilja vertikalar samanleggingar onga ávirkan hava á kappingina, um marknaðarparturin hjá samanløgdu fyritøkuni er undir 30% og miðsavningin (HHI) er undir 2.000[22].

Í sambandi við hesa samanlegging, so fer nýggja felagið at hava **[35-40]**% á marknaðinum fyri gerandisvørur í Eysturoynni v.m. Somuleiðis verður HHI omanfyri 2000 eftir at samanleggingin er gjøgnumførd. Á marknaðinum fyri heilsølu av gerandisvørum hevur P/f Poul Hansen somuleiðis omanfyri 30% av marknaðinum og HHI fyri henda marknað bæði áðrenn og eftir er 3352.

Sambært vegleiðingini eru tað yvirskipað tveir mátar ein vertikal samanlegging kann hindra kapping.

1. **Einsæris árin**: Ein fyritøka, sum fær eina marknaðarráðandi støðu á einum ovara marknaði og einum niðara marknaði, kann fáa møguleika at avbyrgja marknaðin á ymiskan hátt. Fyritøkan kann hava møguleika at avbyrgja kappingarneytar frá týðandi veitingum ella marknaðum. Tílík framferð kann hava við sær, at kappingarneytar hava avmarkaðan møguleika og insitament til at kappast við fyritøkuna, og harvið kann marknaðarráðandi fyritøkan hækka sínar prísir.

   ES Kommissiónin hevur í síni vegleiðing víst á, hvussu møgulig avbyrging av marknaðum kunnu fara fram. Hetta verður viðgjørt í pørtunum 3.2.1 og 3.2.2.

2. **Samskipað árin**: Sum áður víst á undir 3.1 so kann ein samanlegging á einum marknaði, sum longu er miðsavnaður hava við sær, at samskipan verður møgulig, ella gerst enn lættari enn áður.

[22] Hetta er tó treytað av, at ávís onnur viðurskifti somuleiðis ikki eru til staðar. Av tí at marknaðarpartarnir og HHI eru størri enn tey mørk sum eru sett í vegleiðingini, so verða hesi viðurskifti ikki viðgjørd.

Tá ið ein av eigarunum eisini hevur virksemi á einum ovara marknaði er eisini møguleiki fyri samskipan til staðar. T.d. um fyritøkan á ovara marknaði keypir eina sokallaða Maverick – fyritøku. Aftaná slíka yvirtøku vilja sannlíkindi fyri samskipan verða økt.

ES Kommissiónin hevur í síni vegleiðing víst á tær umstøður, sum eru tilstaðar, tá ein vertikal samanlegging kann skapa ella betra um møguleikarnir fyri samskipan á marknaðinum. Hetta verður viðgjørt í pørtunum 3.2.3, 3.2.4, 3.2.5 og 3.2.6.

### 3.2.1. Inntak[23] avbyrging

Ein vertikalt skipað fyritøka kann í ávísum førum avbyrgja ein niðara marknað við at avmarka atgongdina til egnar vørur, og harvið hækka kostnaðarstøðið hjá kappingarneytum á niðara marknað.

Henda støða ger tað møguligt hjá vertikalt skipaðu fyritøkuni at hækka generella prísstøðið á niðara marknaði og harvið fáa størri vinning.

Fyri at staðfesta um tað er møguligt at avbyrgja kappingarneytar, hyggur ES Kommissiónin eftir um vertikalt skipaða fyritøkan hevur møguleika at fremja slíka avbyrging, um hon vil hava insitament til at fremja hesa avbyrging, og um avbyrging vil skaða kappingina á niðara marknaðinum.

Treytin fyri at slík avbyrging kann eydnast er, at inntakið hjá fyritøkuni á ovara marknaði skal hava stóran týdning fyri kappingarneytarnar á niðara marknaði, og at vertikalt skipaða fyritøkan skal verða marknaðarráðandi á ovara marknaði.

Grundleggjandi orsøkin til, at ein fyritøkan fremur avbyrging er altíð, at fyritøkan fær meira burturúr at gera tað enn ikki at gera tað. T.d. um vinningurin er størri á niðara marknaði enn og ovara marknaði. Undir tílíkum umstøðum kann vertikal skipaða fyritøkan fáa størri vinning, um hon fremur avbyrging enn, um hon letur vera.

Kappingareftirlitið metir, at avbyrging er ikki ein vandi í sambandi við hesa samanlegging. Søguliga sæð var vanligt, at heilsølur høvdu einkarætt at selja vørur, men hetta er ikki støðan í dag. Tað eru tó framvegis vørur, kanska serliga innan sodavatn, at tvær heilsølur hava ávísan ekslusivitet til at selja Coca Cola og Pepsi. Men hinvegin kann einhvør selja cola. Sjálvt á hesum øki ber eisini til at umganga føroyska umboðið, tí fyritøkur kunnu venda sær til umboð í øðrum londum, uttan at føroyska umboðið kann gera nakað við hetta.

Í øðrum lagi er ivamál um P/f Poul Hansen hevur eina marknaðarráðandi støðu, tí útlendskir veitarar sita á stórum parti av heilsøluni av gerandisvørum í Føroyum. Somuleiðis er danska felagið Arctic Import A/s eisini farið at selja gerandisvørur til føroyskar keypmenn, so nakað týðir á, at marknaðurin fyri heilsølu av gerandisvørum er opin fyri møguligari kapping.

Kappingareftirlitið metir tí, at avbyrging frá inntaki er ikki møguligt á føroyska marknaðinum fyri heilsølu av gerandisvørum.

### 3.2.2. Kunda avbyrging

Kundaavbyrging kann fara fram, tá ein veitari leggur saman við einum stórum kunda á niðara marknaði. Við at rætta øll síni innkeyp burtur frá kappingarneytunum á ovara marknaði, kann samanlagda felagið avmarka teirra kundagrundarlag somikið, at teir ikki eru kappingarførir á ovara marknaði. Hetta kann

[23] Input

síðani føra við sær, at kappingarneytarnir á niðara marknaði hava torførari at fáa vørur til kappingarførar prísir.

Kundaavbyrging kann fara fram, um vertikalt skipaða fyritøkan kann hindra atgongd til niðara markna, við at avmarka síni keyp frá kappingarneytum á ovara marknað. Orsøkin til at ein vertikalt skipað fyritøka fremur kundaavbyrging, er at fyrimunurin við at avmarka atgongdina til niðara marknað er størri enn vansin við ikki at keypa frá kappingarneytum á ovara marknaði.

Fyri at kundaavbyrging skal kunna eydnast, er ein fyritreyt at vertikal skipaða fyritøkan situr á einum stórum parti av niðara marknaði. Tí tann eftirverandi eftirspurningurin skal vera somikið lítil, at kappingarneytar á ovara marknaði missa sítt kappingarføri.

Kappingareftirlitið metir, at kundaavbyrging er ikki ein vandi í sambandi við hesa samanlegging. Meðan tað eru fleiri landafrøðiligir marknaðir fyri smásølu av gerandisvørum, so er bert ein marknaður fyri heilsølu av gerandisvørum.

Tá metast skal um kundaavbyrging er møgulig, skal støði takast í eftirspurninginum hjá nýggja felagnum samanborið við samlaða eftirspurningin í Føroyum. Eftirspurningurin hjá nýggja felagnum verður áleið **[10-15]**% av samlaða eftirspurninginum í Føroyum.

Her skal tó viðmerkjast, at P/f Poul Hansen hevur sølusamstarv við stóran part av marknaðinum. Ein treyt fyri at luttaka í hesum samstørvum er at áleið 60% av vørunum skula keypast frá P/f Poul Hansen. Hinvegin eru linar treytir fyri uppsøgn av samstarvinum.

Tað hevur eisini týdning, at ein munandi partur av søluni á niðara marknaði liggur hjá fyritøkum, sum ikki vildu verið ávirkaðar av eini kundaavbyrging. Her verður serliga hugsað um at P/f SMS og L/f Føroya Keypssamtøka keypa beinleiðis frá útlendskum veitarum, somuleiðis er við Keyp-handlunum.

### 3.2.3 Áseting av treytum fyri samskipan

Ein avleiðing av eini vertikalari samanlegging kann verða, at fyritøkurnar á marknaðinum gerast meira líkar. Búskaparligar eindir, sum eru líkar hava lættari at samskipa sína framferð, tí teirra umstøður eru nøkulunda eins.

Ein vertikal samanlegging kann eisini lætta um eina samskipan á marknaðinum, um ein av samanløgdu fyritøkunum er ein sokallað maverick fyritøka. Samanleggingin kann hava við sær, at fyritøkan gevst við at ganga í móti rákinum, og tí minkar tað kappingarliga trýstið, sum hon áður legði á kappingarneytar.

Kappingareftirlitið metir, at hesar umstøður eru ikki til staðar í sambandi við hesa samanlegging. Tað er eitt eyðkenni fyri marknaðin fyri smásølu av gerandisvørum, at einstøku fyritøkurnar eru ymiskar. T.d. so er P/f SMS ein vertikalt skipað fyritøka, somuleiðis er við Føroya Keypsamtøku, men her er tann munur, at meðan fyrst nevnda er eitt privat partafelag, so er hin eitt lutafelag, sum byggir á danska samvinnu-prinsippið. Síðani eru fleiri smærri og størri keypmenn um alt landið. Teir flestu eru limir í antin Samkeyp ella Á, men seinastu trý árini eru nakrir keypmenn farnir í nýtt sølusamstarv við danska felagið Arctic Import A/s.

### 3.2.4 Eftirlit við frávikum

Ein vertikal samanlegging kann hava við sær, at fyritøkur kunna fáa atgongd til upplýsingar um kappingarneytar, sum tær annars ikki vildu havt møguleika at fingið. Ein vertikalt skipað fyritøka fær natúrliga innlit í viðurskifti hjá sínum kappingarneytum á ovara marknaði, umvegis sítt samband við hesar, sum kundi.

Kappingareftirlitið metir, at henda samanlegging økir ikki um møguleikan hjá P/f Poul Hansen at hava eftirlit við sínum kappingarneytum á marknaðinum fyri heilsølu av gerandisvørum. Nýggja felagið fer at

sita á **[10-15]**% av marknaðinum fyri smásølu av gerandisvørum, og er hetta neyvan nokk til, at P/f Poul Hansen fer at kunna hava slíkt eftirlit.

**3.2.5 Straffur fyri frávik**

Ein vertikalt skipað fyritøka kann í størri mun geva fyritøkum sum luttaka í samskipan incitament til at halda seg til samskipanina, tí vertikala fyritøkan hevur antin status sum ein týðandi veitari ella kundi.

Kappingareftirlitið metir, at tað er viðkomandi fyri viðgerðina av hesum máli, at P/f Poul Hansen hevur handilsligt samband við ein stóran part av føroyska marknaðinum fyri gerandisvørur. Sum veitari og samstarvsfelagi hjá teimum fyritøkum sum luttaka í Samkeyp og Á, er P/f Poul Hansen uttan iva tann mest týðandi samstarvsfelagin hjá hesum fyritøkum. Av somu orsøk hevur Kappingareftirlitið viðgjørt avtalurnar í hesum tilmæli til Kappingarráðið. Tað sum Kappingareftirlitið heftir seg við er, at avtalurnar eru ikki serliga bindandi fyri luttakandi fyritøkurnar. Hinvegin kann tað ikki síggjast burturfrá, at skulu fyritøkur úr hesum samstørvum, so vil tað undir øllum umstøðum kosta teimum munandi upphæddir, tí tær nú standa einsamallar við síni marknaðarføring.

Kappingareftirlitið metir tó, at bygnaðurin á marknaðinum, herundir at ein nýggj keta er komin inn á marknaðin, ger at P/f Poul Hansen ikki er í eini støðu at straffa fyri møgulig frávik frá eini samskipan.

**3.2.6 Reaktión frá øðrum fyritøkum**

Fyri at ein samskipan skal eydnast er neyðugt, at tað ikki eru aðrar fyritøkur sum kunnu forkoma samskipanini.

Kappingareftirlitið metir, at sum áðurnevnt so eru tvær aðrar fyritøkur á marknaðinum, sum eru vertikalt skipaðar og eru tí meir ella minni leysar av P/f Poul Hansen. Harumframt er nýggj keta komin inn á føroyska marknaðin, sum er í gongd við at skapa sær eitt sølugrundarlag.

**Ávegis niðurstøða**

**Einsæris árin:** Nýggja felagið kemur at hava ein stóran marknaðarpart á einum av tveimum marknaðum innan smásølu av gerandisvørum, samstundis sum annar av eigarunum eisini hevur heilsølu.

Nýggja felagið og eigarin sum hevur heilsølu hava marknaðarpartar sum liggja omanfyri tey mørk, har sigast kann at ein samanlegging onga ávirkan kemur at hava á kappingina(**sí 3.2**).

Henda støða kann undir ávísum umstøðum gera tað møguligt á ymsan hátt, at avbyrgja marknaðin og harvið avmarka kappingina. Kappingareftirlitið hevur tí kannað, um umstøður eru tilstaðar sum kunna gera tað møguligt og sannlíkt, at slík avbyrgjan kann fara fram(**sí 3.2.1-3.2.2**).

Kappingareftirlitið metir at hesar umstøður eru ikki til staðar í hesi samanlegging.

**Samskipað árin:** Miðsavning á ovara og niðara marknað verður eftir samanleggingina á einum støði sum liggur omanfyri tey mørk, har sigast kann at samanleggingin onga ávirkan kemur at hava á kappingina (**sí 3.2**).

Kappingareftirlitið hevur tí kannað um samskipað árin (coordinated effects) kunna skaða virknu kappingina á marknaðinum. Í hesum sambandi er hugt eftir, um tær umstøður, sum vanliga skula verða til staðar fyri at samskipan kann fara fram, eru til staðar í hesi samanlegging(**sí 3.2.3-3.2.6**).

Kappingareftirlitið metir at hesar umstøður eru ikki til staðar í hesi samanlegging.

## 3.3. Atknýttar avmarkingar

Ein atknýtt avmarking er beinleiðis knýtt til samanleggingina og alneyðug fyri, at samanleggingin kann fremjast í verki. Slíkar avtalur hava vanliga til endamáls at tryggja virðið á tí, sum skiftir eigara í einum avmarkaðum tíðarskeiði.

Í sambandi við hesa samanlegging eru gjørdar avtalur, har fyrivarni verður tikið í móti kapping, um samstarvið steðgar.

Í fyrsta lagi er ásett, at fer Kristian Suni Haraldsen frá sum stjóri, kann hann ikki í einum tíðarskeiði á **[...]** ár eftir at hann er farin úr starvi, beinleiðis ella óbeinleiðis byrja, ella hava fíggjarlig áhugamál í nøkrum virksemi, sum heilt ella partvís kappast við tað virksemið nýggja felagið rekur.

Í øðrum lagi er ásett, at ynskir Kristian Suni Haraldsen at støðga samstarvinum **[og brúka serliga exit-møguleikan]**, so kann hann hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis fara undir annað virksemi sum er í kapping við virksemið hjá nýggja felagnum til **[...]** ár eru gingin frá tí, at samstarvið var uppsagt.

Tílíkar ásetingar hava til endamáls at tryggja, at keyparin hevur møguleika at fáa fullan ágóða av tí sum er keypt. Hetta verður gjørt við, at seljarin verður hindraður í at byrja virksemi í kapping við keyparan í einum avmarkaðum tíðarskeiði. Tílíkar ásetingar eru bert viðkomandi um virðið á tí keypta eisini inniheldur antin goodwill í form av at kundatrúskapi, kow-how ella bæði.

Slíkar ásetingar kunnu góðtakast sum atknýtt avmarking til samanleggingina, um longdin á forboðnum, landafrøðiliga avmarkingin, og innihaldið av forboðnum, ikki er meira víttfevnandi enn neyðugt er fyri at røkka endamálinum.

Sambært ES leiðbeining um atknýttar avmarkingar[24] , so kunnu slíkar ásetingar góðtakast upp í trý ár. Treytin er, at tað í sambandi við samanleggingina eisini verða yvirtikið goodwill og know-how. Er bara talan um goodwill, kann slík avmarking í mesta lagi vara 2 ár.

Landafrøðiliga avmarkingin skal vera tey økir, har fyritøkan seldi sínar vørur áðrenn samanleggingin var framd. Í sambandi við hesa samanlegging kann sigast, at landafrøðiliga avmarkingin eigur at verða avmarkað til tey økir, har handlarnir hjá Haraldsen seldu sínar vørur.

Tá tað kemur til vøruavmarkingina, er tað galdandi, at talan skal verða um tær vørur fyritøkan seldi áðrenn samanleggingina. T.v.s. smásøla av gerandisvørum.

Kappingareftirlitið metir, at fyrivarni í móti kapping er ov víttfevnandi. Ásetingin eigur at vera avmarkað til tað virksemið sum verður lagt í nýggja felagið, og avmarkast til tey landafrøðiligu økir har hetta virksemið var útint áðrenn samanleggingina. Áðrenn samanleggingina hevði Sp/f KSJ smásølu í Eysturoynni, og metir Kappingareftirlitið at fyrivarni í móti kapping eigur at avmarkast til hetta økið.

## 3.4 Samlað meting

Kappingareftirlitið tók tann 22. oktober avgerð um, at fráboðaða samanleggingin av smásøluni hjá P/f Poul Hansen og Sp/f KSJ ikki kundi góðkennast av Kappingareftirlitinum eftir §15, stk. 5, tí samanleggingin førdi við sær, at marknaðarparturin hjá nýggja felagnum fór upp um 25% á einum av marknaðunum sum felagið fer at hava virksemi á. Afturat hesum hevur samanleggingin við sær, at miðsavningin og broytingin av sama, fór at vera á einum støði, sum ikki uttan víðari kann sigast at verða uttan trupulleikar fyri kappingina á marknaðinum.

[24] (2005/C 56/03), pkt. 20

Kappingareftirlitið

Kappingareftirlitið hevur í hesum sambandi gjørt eina gjøllari kanning av marknaðinum, herundir er mett um bæði tey horsisontalu og vetikalu viðurskifti, sum verða galdandi eftir samanleggingina.

Kappingareftirlitið er komið til ta niðurstøðu, at um bara verður hugt eftir horisontalu viðurskiftunum, ið standast av hesi samanlegging, so er greitt at samanleggingin fer ikki at hindra virknari kapping.

Tá ið atlit verður tikið til tey vertikalu viðurskifti sum eisini verða galdandi eftir samanleggingina, kann ikki síggjast burtur frá, at P/f Poul Hansen situr á einum munandi parti av marknaðinum fyri heilsølu av gerandisvørum í Føroyum.

Kappingareftirlitið er komið til ta niðurstøðu, at tey vertikalu viðurskifti sum verða galdandi eftir samanleggingina, fara ikki at hindra virknari kapping.

Atknýttar avmarkingar eru ofta neyðugar í sambandi við samanleggingar, tí tær tryggja, at keyparin fær møguleika at fáa fullan ágóða av tí sum keypt er. Hinvegin er talan um eina avmarking av kappingini ella møguligari kapping. Tað er tí neyðugt, at slíkar ásetingar ikki fara longri enn teirra endamál.

Kappingareftirlitið er komið til, at tær atknýttu avmarkingar, sum partarnir hava avtalað í sambandi við hesa samanlegging eru ov víttgangandi samanborið við ta siðvenju, sum Kappingarráðið hevur lagt á hesum øki.

## 3.5. Tilsøgn

Fráboðari hevur í telduposti tann 26. november 2015 givið tilsøgn um, at ásetingin í §5 í Eigaraavtaluni um fyrivarni í móti kapping verða broyttar soleiðis, at ásetingin verður avmarkað til tað landafrøðiliga økið, sum er skilmarkað í 2.4.3 og 2.4.4 í hesi avgerð.

Hetta merkir, at fyrivarni í móti kapping sum er í Eigaravtaluni verður avmarkað til Eysturoy og Streymoy.

## 4. Niðurstøða

Kappingarráðið hevur avgjørt at góðkenna samanleggingina av smásøluni hjá P/f Poul Hansen og Sp/f KSJ, vísandi til §15, stk. 2, 1. pkt. í kappingarlógini, sum sigur at ein samanlegging sum ikki munandi forðar fyri virknari kapping skal góðkennast.

Góðkenningin verður tó treyta av, at broytingar verða gjørdar í Eigaraavtaluni, viðvíkjandi § 5, soleiðis at fyrivarni ímóti kapping skal avmarkast til tað skilmarkað økið í parti 2.4.3 og 2.4.4 í hesi avgerð.

*Fráboðari hevur tann 26. november 2015 sent Kappingareftirlitinum tilsøgn um, at áðurnevndu broytingar í §5 verða framdar.*

Vegna Kappingarráðið

Heri Joensen
Formaður

Terje Sigurðsson
deildarstjóri